# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Hesin dysturin hevur alt at siga. Nú hava vit spælt knald eller fald dystir í fleiri vikur á rað, so nú skulu vit ikki missa alt á málstrikuni.*
*Hjalti M. Jacobsen, Kyndil*

Kyndil-StÍF:

## Oddabrak á Hálsi

**Stórdystur verður í høllini á Hálsi sunnudagin, tá ið Kyndil tekur ímóti StÍF í Atlantic Airways kappingini. Hesi bæði liðini liggja í løtuni og kappast um annað seinna finaluplássið**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Toppdystur verður í høllini á Hálsi sunnudagin, tá ið Kyndil tekur ímóti StÍF. Vinnur Kyndil dystin, so eru teir klárir til FM-finaluna*

Lagt verður upp til satt brak í oddinum í bestu mansdeildini í hondbólti sunnudagin, tá ið Kyndil tekur ímóti StÍF. Í løtuni liggur Kyndil á øðrum plássi í landskappingini, men munurin niður til StÍF er bert tað eina stigið, so tí hava bæði liðini brúk fyri einum sigri í dystinum sunnudagin.

Longu nú er tó greitt, at fer grøna havnarliðið avstað við báðum stigunum sunnudagin, so eru teir klárir til FM-finaluna.

### Strandingar væl fyri

Hjá strandingum sær gott út við fólki. Teir hava spælt uttan Svein Justinusen í at kalla alt kappingarárið, men síðsta mánaðin hevur Sveinur verið partur av besta liðnum hjá StÍF. Venjingarstøðna er blivin betri og betri, so Sveinur er uttan iva ein stórur styrkur hjá StÍF.

Onkrir av strandingum hava verið raktir av influensu í vikuni, men nú er líkt til, at allir mans eru við at vera klárir. Leivur Justinusen sigur, at StÍF bert kann brúka ein sigur.

- Har er einki at ivast í hjá okkum. Dysturin skal vinnast, tí vit fáa ikki brúkt nakað annað enn ein sigur sunnudagin. Vinnur Kyndil, so hava vit ongan møguleika at fanga teir aftur.

Leivur leggur afturat, at uppskriftin er einkul. Hann sigur at spælararnir mugu bara fara á vøllin at berjast í samfullar 60 minuttir, og so má man fáa at síggja, hvussu langt tað ber.

### Enn ein finala

Kyndil hevur sama fólk tókt til dystin ímóti strandingum, sum teir høvdu seinasta vikuskiftið ímóti KÍF. Tað vil siga, at Ragnar Stakksund ikki verður við í hópinum sunnudagin, tí hann er uttanlands.

Kyndil hevur annars verið í fleiri knald eller fald dystum sísðtu tíðina, og Hjalti Jacobsen sigur, at hetta verður aftur ein av teimum.

– Hesin dysturin hevur alt at siga. Nú hava vit spælt knald eller fald dystir í fleiri vikur á rað, so nú skulu vit ikki missa alt á málstrikuni. Dysturin ímóti StÍF skal vinnast, so vit sleppa í hasa finaluna, sigur Hjalti.

Neistin-VÍF:

## VÍF kann spæla seg í finaluna

**Vinnur VÍF dystin ímóti Neistanum í Atlantic Airways kappingini hjá monnum leygardagin, so eru teir klárir at spæla finalu um meistaraheitið seinni í mánaðinum**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

At kalla alt kappingarárið hevur VÍF verið væl betri enn hini liðini. Eftir eina heldur trilvandi byrjan í heyst komu teir so við og við fyri seg, og í stórum pørtum av kappingini hava teir ikki verið til at steðga. Síðstu dystirnar hevur tó ikki gingið so væl hjá sigursvanda felagnum úr Vestmanna, og hetta hevur ført við sær, at fleiri feløg nú liggja í hølunum á teimum. Eitt er tó sikkurt fyri VÍF. Vinna teir dystin ímóti Neistanum leygardagin, so eru teir klárir til finaluna um meistaraheitið.

### Neistin úti av heiðursmerkjastríðnum

Síðsta vikuskiftið spældi Neistin ein sera týdningarmiklan dyst ímóti strandingum. Um teir skuldu varðveita møguleikarnar at vinna heiðursmerkir, so skuldi hesin dysturin vinnast. StÍF vann tó dystin, so Neistin hevur í roynd og veru ikki tað stóra at spæla fyri ímóti VÍF. Teir hava tó fingið fleiri góð úrslit ímóti vestmenningum í ár, so teir fara helst at royna at fáa enn eitt gott úrslit leygardagin.

### VÍF á finalukós

VÍF hevur verið heldur svingandi síðstu dystirnar, men av tí at teir hava fingið so góð úrslit ígjøgnum árið, so liggja teir í eini sera góðari støðu undan dystinum ímóti Neistanum. VÍF er nevniliga tvey stig frammanfyri Kyndil á øðrum plássi og trý stig frammanfyri StÍF á triðja plássi. Tað vil siga, at vinna teir dystin ímóti Neistanum, so eru teir klárir til finaluna.

VÍF má eisini metast at vera favorittur undan dystinum. Í mun til Neistan, so hava teir alt at spæla um, og hesin dysturin skal bara vinnast hjá VÍF. Í teimum undanfarnu dystunum hevur VÍF vunnið ein, Neistin vunnið 1 og ein er endaður javnur, so munurin hevur ikki verið tann stóri á liðunum í ár. Kanska Neistin enn einaferð fer at geva VÍF ein skarpan gang.

## Stjørnan er stórfavorittur

Fyrru hálvfinurnar í Sunset-kappingini hjá kvinnum vera á skránni leygardagin, og í aðrari hálvfinaluni tekur StÍF ímóti Stjørnuni. Stjørnan vann grundspælið, meðan StÍF endaði á fjórða plássi, tí má Stjørnan metast at vera stórfavorittur at vinna dystin. Gongdin hjá Stjørnuni hevur eisini verið sera góð síðstu dystirnar, og tær hava mest sum skúgvað alla mótstøðu til viks í bestu kvinnudeildini. StÍF hevur eisini fingið fleiri góð úrslit í seinastuni, men tað man vera ivasamt, um tær hava nakran møguleika at spæla seg í finaluni ímóti einum vælleikandi stjørnuliði. Einki er tó at ivast í, at StÍF fer at kempa fyri møguleikanum.

## Sigur er krav hja KÍF

Sunnudagin verður ein dystur í bestu mansdeildini í hondbólti í Kollafirði, har KÍF tekur ímóti H71. Undan dystinum liggur KÍF á fjórða plássi, meðan H71 liggur aftast. Sjálvt um kollfirðingarnir eru at finna á fjórða plássi, so hava teir alt at spæla fyri ímóti hoyvíkingum. KÍF hevur nevniliga enn ein lítlan møguleika at koma í finaluna, men so skal dysturin ímóti H71 eisini vinnast. H71 hevur í sínum lag ikki tað heilt stóra at spæla um, men teir ætla sær uttan iva at geva KÍF harða mótstøðu.